Ferðavinnu
felagið

ÁRSFRÁGREIÐING

# 2020

# Innihaldsyvirlit

Formansfrágreiðing til ársaðalfundin ........ 5
Endamál felagsins ........ 7
Nevndin í Ferðavinnufelagnum ........ 7
Limatal í Ferðavinnufelagnum ........ 7
Limagjald í Ferðavinnufelagnum ........ 7
Um Ferðavinnufelagið ........ 8
Árið 2020 ........ 9
Gongd í haga ........ 9
Bóka Beinleiðis ........ 10
Einkarinnkeypi hjá Rúsdrekkasølu Landsins ........ 10
Støðan nú og frameftir ........ 12
Viðtøkur felagsins ........ 13

# Formansfrágreiðing til ársaðalfundin

Aðalfundurin fyri 2019 var ikki hildin fyrr enn síðst í september vegna Korona, so tað er ikki nógv meira enn eitt hálvt ár síðani, vit seinast hittust til aðalfund.

Tó er nógv hent í felagnum hetta hálva árið og nevndin hevur havt nógvar fundir, ið allir hava havt Koronu á skrá.

Ferðavinnan hevur at kalla ligið still seinasta árið. Fyritøkurnar hava niðurlagað og lagt virksemið um. Fortreytirnar fyri virkseminum eru broyttar, og vit eru alt færri at loysa broyttu uppgávurnar.

Í Ferðavinnufelagnum er virksemi eisini broytt. Undan Korona viðgjørdu vit útbúgving og rekruttering til ferðavinnuna. Grønar loysnir fyri matstovuvinnuna viðvíkjandi lívrunnum burturkasti, og vit løgdu ætlanir fyri Ferðavinnustevnuna, økisvitjanir og skeiðir.

Vit fyrireikaðu tvær Ferðavinnustevnir, men eingin var hildin. Økisvitjanin var av ongum. Eitt skeið var tó á skránni, og gistingarhúsini fingu sínar klassifikatiónir frá HORESTA, so onkrir glottar vóru.

Sum greitt frá á seinasta aðalfundi, so er øll orka hjá felagnum, og meira enn tað, farin í at arbeiða við at tryggja ferðavinnuni best møguligar treytir undir Korona.

Ferðavinnufelagið stríddist fyri hjálparpakka 3 til ferðavinnuna. Tað var ikki løtuverk. Eitt stórt arbeiði liggur aftanfyri hjá bæði felagi, nevnd og limum.

Tá ið hjálparpakki 3 rann út, var skjótt greitt, at tørvur fór at vera á hjálparpakka 4. Tað vísti seg tó at vera torført at fáa Landsstýrið at síggja álvaran og at taka áheitanir og umbønir hjá Ferðavinnufelagnum til eftirtektar. Føroyska samfelagið var sum heild var ikki longur merkt av Korona avmarkingum, og forstáilsi var ikki fyri, at ferðavinnuni tørvaði hjálp. Felagið gjørdi tí av at broyta framferðarhátt og kallaði inn til limafundar fyri at fáa staðfest tørvin og hugskot til, hvussu hetta skuldi fremjast í verki.

Í stríðnum fyri hjálparpakka 4 hevur ferðavinnan staðið saman og stuðlað hvør øðrum. Vit hava víst okkara styrki og arbeitt fyri felags áhugamálum. Tað er júst hetta Ferðavinnufelagið snýr seg. Limirnir mynda felagið, uttan limir var einki felag.

Sum øllum kunnugt hevur Ferðavinnufelagið lagt nógva orku í at fáa Landsstýrið og føroyingar sum heild at síggja tørvin í ferðavinnuni fyri afturberingarskipanum. Farna árið hevur Ferðavinnufelagið eisini hugt at, hvat felagið sjálvt kann gera fyri at bøta um støðuna. Eitt tað fyrsta hugskotið sum komið var fram til, vóru átøk at stimbra innlendis ferðavinnuna. Felagið vendi sær tí til Visit Faroe Islands viðvíkjandi einum møguligum samstarvi. Visit Faroe Islands vísti beinanvegin áhuga og tók uppgávuna á seg saman við kunningarstovunum.

Gjøgnum limaskapin hjá Ferðavinnufelagnum í HORESTA kunnu gistingarhús í Ferðavinnufelagnum nú luttaka í átakinum 'BÓKA BEINLEIÐIS'. Bóka beinleiðis er eitt evropeiskt tiltak, hvørs endamál er at stimbra ferðandi at bíleggja beinleiðis frá veitaranum, heldur enn at brúka altjóða bókingarportalar, ið taka kommissión og harvið vinning av landinum. Altjóða bókingarportalar hava seinastu árini vundið alt meira upp á seg, serliga innan ferðing og gisting. Ferðavinnufelagið er sera fegið um, at hetta samstarv er komið í lag og metir, at hetta arbeiðið framhaldandi skal raðfestast.

Gongd í haga er framvegis eitt stórt mál í ferðavinnuni, men leikluturin hjá Ferðavinnufelagnum í hesum málinum er ikki stórur løtuni. Ferðavinnufelagið arbeiddi fyri at fáa  hetta mál á skrá hjá politiska myndugleikanum, og tað eydnaðist. 'Gongd í haga' kom í samgonguskjalið, og lógaruppskot er greitt úr hondum. Uppskotið hevur verið í politiskari viðgerð og í løtuni verður roynt at fáa semju millum áhugapartarnar. Ferðavinnufelagið fylgir málinum og metir støðugt um støðuna.

Við hesum orðum fari eg takka tykkum øllum fyri tykkara íkast farna árið og latið okkum halda fram at standa saman um felagið og at reka fleiri limir til. Korona hevur prógvað, at stórur tørvur er á einum

felagið sum okkara, har vit øll kunnu standa saman um føroysku ferðavinnuna og útinna felags áhugamál. Vit øll, ið eru limir, standa sterkari, tá ið arbeitt verður eftir einum felags leisti. Jú fleiri limir vit eru í felagnum, jú sterkari standa vit mótvegis myndugleikum, áhugabólkum og øðrum aktørum í samfelagnum.

Eg vil takka tykkum fyri stuðulin og heita á tykkum um altíð at siga frá, um tit meta, at felagið er á skeivari kós, ella um tit hava mál, ið tit meta felagið skuldi farið undir.

Takk fyri.

Tórshavn, 7. mai 2021

Henny á Líknargøtu
formaður

# Endamál felagsins

## Nevndin í Ferðavinnufelagnum

Henny á Líknargøtu, nevndarformaður
Árni Olsen, næstformaður
Aleth Nielsen
Hans Jákup Kollslíð
Sakaris Frederiksen

Tórstein Christianen, tiltakslimur



*Frá vinstru: Tórstein Christiansen, Árni Olsen, Aleth Nielsen, Henny á Líknargøtu, Hans Jákup Kollslíð og Sakaris Frederiksen*

## Limatal í Ferðavinnufelagnum

Í løtuni eru 39 limir í felagnum.

## Limagjald í Ferðavinnufelagnum

Limagjaldið í Ferðavinnufelagnum er ásett eftir, hvussu nógv ársverk eru í viðkomandi ferðavinnufyritøku, sí talvuna niðanfyri.

| **Ársverk** | **Limagjald** |
|---|---|
| 1 | kr. 2.000,- |
| 2-5 | kr. 4.000,- |
| 6-10 | kr. 8.000,- |
| 11-20 | kr. 12.000,- |
| 21-50 | kr. 16.000,- |
| 51-100 | kr. 20.000,- |
| 101- | kr. 32.000,- |

## Um Ferðavinnufelagið

Ferðavinnufelagið varð stovnað sum vinnugreinafelag í Vinnuhúsinum í 2008 við tí endamáli at savna allar ferðavinnufyritøkur at útinna felags áhugamál, soleiðis at ferðavinnan gerst týðandi táttur í føroyska búskapinum.

Gistingarhús- og Matstovufelag Føroya, sum varð stovnað í 1995, var avtikið í  2010 og lat ognir sínar til Ferðavinnufelagið.

Ferðavinnufelagið fevnir í dag breitt um alla vinnuna og røkir áhugamál limanna. Felagið skipar regluliga fyri skeiðum og fyrilestrum og leggur seg eisini eftir at samansjóða vinnuna við ymsum tiltøkum, sum eggja til samstarv í vinnuni.

Ferðavinnufelagið er sjálvstøðugt felag, sum heldur til í skrivstovufelagsskapinum í Vinnuhúsinum saman við øðrum vinnugreinafeløgum. Ferðavinnufelagið er ikki limur í Føroya Arbeiðsgevarafelag, men flestu størru fyritøkurnar í felagnum eru eisini limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag.



*Tíverri vóru nærum øll limatiltøk avlýst í 2020. Eisini Ferðavinnustevnan, sum skuldi verið í Kongshøll.*

# Árið 2020

Ferðavinnuárið 2020 bleiv eitt vánaligt ár hjá Ferðavinnuni. Málið var eitt nú at koma upp á 200.000 gistingar og 1 mia. í umsetningi í 2020. Men hesi sølumál blivu langt frá rokkin. Korona hevur verið ein dyggur smeitur fyri ferðavinnuna. Koronatilmælini skryktu brádliga alt inntøkugrundarlagið undan ferðavinnuni.



Stóri vøksturin seinastu árini og góðu útlitini fyri framhaldandi vøkstri, hava skapt bjartskygni í ferðavinnuni, og ferða-, matstovu- og gistingarhúsvinnan hevur eisini gjørt stórar íløgur seinastu árini.

Hesar íløgur hevur ferðavinnan gjørt, fyri at føroyska samfelagið skal verða tilreiðar at taka ímóti stóru avbjóðingunum og møguleikunum í ferðavinnuni. Tá ið Korona rakti vóru fleiri av hesum íløguverkætlanunum framvegis í gerð og høvdu tí einki kastað av sær, tá ið koronatiltøkini læstu alla føroysku ferðavinnuna niður.

Korona hevur rakt ferðavinnuna í eini viðbreknari tíð. Landið hevur tó skipað fyri afturberingarskipanum, sum hava munað. Hjálparpakki 1 hjálpti fyritøkunum at varðveita starvsfólk. Hjálparpakki 3 og 4 hava eisini munað, hósast vinnan ynskti betri pakkar.

Ferðavinnutølini fyri 2020 eru kunngjørd. Gistingartølini vóru nógv lægri enn undanfarnu ár og samlaði umsetiningurin í vinnuni var áleið 300 millliónir, ið er 700 milliónir lægri enn ætlað. Tað er avgerandi fyri ferðavinnuna, at tað sum skjótast verður grundarlag aftur fyri ferðavinnuvirksemi í 2021, soleiðis at fyritøkurnar kunnu fóta sær aftur.

## Gongd í haga




Í nógv ár hevur Ferðavinnufelagið víst á, at tørvur er á eini landsfevnandi loysn viðvíkjandi gongd í haga, nú ymisk hagastýri og bóndir seinastu árini hava boðað frá gjøldum og serligum treytum fyri at fáa atgongd til lendi, sum teir eiga ella leiga.

Skulu vit tryggja eina burðadygga menning av ferðavinnuni, mugu vit spjaða ferðavinnuna - bæði á árinum, men eisini kring landið, soleiðis at so nógv øki í landinum sum gjørligt kenna ágóðarnar av ferðavinnuni við øktum vøkstri, fleiri starvsmøguleikum, øktum virksemi og fleiri tænastuveitingum.

Tess fleiri ymisk gjøld og ymiskar skipanir verða galdandi kring landið, tess torførari og ólagaligari verður tað hjá ferðasmiðjunum at selja túrar kring oyggjarnar, og málið um at spjaða ferðafólkini kring landið gerst torførari at røkka.

Tørvur er á at skipa økið, dagføra lóggávuna og seta í verk eina gjøgnumskygda og landsfevnandi skipan, sum tryggjar hóskandi og rímiligar treytir. Ferðavinnufelagið hevur ta áskoðan, at vit eiga at stimbra menningina av vørum og tænastum kring landið.

Heldur enn at taka gjøld eiga vit at hava tilboð at bjóða ferðafólkunum, sum vit kunnu taka pening fyri.

Ferðavinnufelagið mælir frá at falla fyri freistingini at leggja gjøld á ferðavinnuna við tí fyri eyga at fáa so nógvan pening sum gjørligt burtur úr hvørjum einstøkum ferðandi. Hetta hevði gjørt, at føroyska ferðavinnan hevði mist kappingarføri. Ferðavinnan er útflutningsvinna og er í kapping við allan heimin. Sum ferðamál eru Føroyar, sum er, eitt kostnaðarmikið ferðamál.

Tað kann skaða umdømi hjá Føroyum sum ferðamál, um vit ikki hava gjøgnumskygdar skipanir við innkrevjing av gjøldum fyri atgongd til náttúruna. Gjald ella ikki gjald, so skal sama reglugerð verða galdandi í øllum landinum.

Í sambandi við løgtingsvalið í 2019 hevði Ferðavinnufelagið sum valynski eina landsfevnandi loysn fyri gongd í haga. Eitt filmsbrot var m.a. gjørt fyri at gera vart við trupulleikan.

## Bóka Beinleiðis

Ferðavinnufelagið hevur gjøgnum sín limaskap í HORESTA fingið loyvi at fáa lut í átakinum hjá HOTREC, sum skal stimbra ferðandi at bíleggja beinleiðis frá veitaranum, heldur enn at brúka altjóða bókingarportalar.

Búmerki hjá átakinum er tillagað til føroyskt og kann brúkast til heimasíður og líknandi. Enska búmerkið er eisini fingið til taks. Faldarar og 'table tents' eru prentað í bæði føroyskari og enskari útgávu.

## Einkarinnkeypi hjá Rúsdrekkasølu Landsins

Í mong ár hevur Ferðavinnufelagið víst á, at skipanin við einkarinnkeypi gjøgnum Rúsdrekkasølu Landsins er tarnandi fyri vinnuna og hevur ongan tilverurætt í mun til rúsdrekkanýtsluna hjá vanliga brúkaranum. Ferðavinnufelagið mælir tí til at strika innkeypsmonopolið í rúsdrekkalógini.

Ongastaðni í londunum kring okkum, eru fortreytirnar hjá matstovuvinnuni at keypa inn so vánaligar sum í Føroyum. Í fleiri norðurlondum er einkarsøla, men tey hava ikki einkarinnkeyp. Har hava loyvishavarar møguleika at keypa inn frá øðrum enn einkarsøluni. Núverandi støða við einkarinnkeypi er tarnandi fyri kappingarførið hjá matstovuvinnuni, sum frammanundan er ein útreiðslutung vinna.

Hugsa vit um rúsdrekkanýtsluna hjá endabrúkaranum, ger tað ongan mun, um ein matstova keypir frá eini heilsølu, Rúsdrekkasølu Landsins ella innflytir sjálv. Í so máta broytist einki fyri vanliga brúkaran.

Einkarsølan hjá Rúsdrekkasølu Landsins fer at halda fram sum higartil. Tískil er einki til hindurs fyri at avtaka einkarinnkeyp á øllum vørubólkum, uttan mun til vøruslag ella rúmprosent.

Innflutningurin og innkeypið gjøgnum Rúsdrekkasøla Landsins er ein fløskuhálsur hjá matstovuvinnuni í mun til at reka skynsaman matstovurakstur, og vinnan ynskir tískil sjálv at standa fyri innkeypinum á bæði øl, víni og sterkari rúsdrekka, soleiðis at hon kann tryggja eitt gott og høgt tænastustøði á øllum økjum.

Tað hevur stóran týdning, at føroyskar matstovur hava møguleika at keypa inn á vanligum handilsligum grundarlagi. Ferðavinnan er í grundini ein útflutningsvinna, sum er í harðari kapping við tænastur uttanlands. Í rúsdrekkahøpi er einki annað land í norðurlondum, sum hevur ta skipan, vit í Føroyum hava við einkarinnkeypi av rúsdrekka.

Føroyska matmentanin fær í dag altjóða viðurkenning í kappingum og úrtøkum uttanlands, eins og hon verður vird á ein hátt, vit ikki kundu droymt um fyri bert fáum árum síðani. Tað er í stóran mun váðafýsni, áræði og slóðbrótaraanda at takka, at vit nú eru í hesi støðu. Neyðugt er tískil at skapa karmar fyri, at hesin eldhugur framhaldandi kann spíra og nørast - ikki bara í Havn, men kring allar oyggjarnar

Inntøkugrundarlagið hjá matstovum kring landið er spinkult, og neyðugt er at tryggja frítt innkeyp til loyvishavarar, soleiðis at matartilboðini kring landið kunnu fjølgast og fjøltáttast.

Ferðavinnufelagið er av teirri áskoðan, at talan er um eina óneyðuga forðing og at einkarinnkeypið hjá Rúsdrekkasølu Landsin eigur at avtakast. Hetta var eisini eitt valynski til løgtingsvalið í 2019. Felagið hevur í øðrum sambandi latið gjørt eitt filmsbrot fyri at lýsa trupulleikan.



*Lond, ið hava einkarsølu men ikki einkarinnkeyp*

# Støðan nú og frameftir

Ferðavinnufelagið ynskir framhaldandi at styrkja seg sum felag. Tað verður mett týdningarmikið at styrkja felagið við fleiri limum og at tryggja, at felagið hevur limir kring allar Føroyar.

Støðan í heiminum er framvegis óviss, og tað er ilt at meta um, hvat er í hondum. Virksemið í Ferðavinnufelagnum er tengd at hesi støðu. Farna árið er farið til at tryggja umstøðurnar hjá ferðavinnuni so væl sum gjørligt í eini kripputíð. Tíðin fer at vísa, hvat orkan komandi árið fer við.

Vónin er, at felagið aftur kann fara í holt við at kanna grønar loysnir fyri lívrunnið burturkast, tørv á ferðavinnuútbúgvingum, rekrutering til ferðavinnuna og líknandi átøk.

Felagið hevur altíð raðfest limatiltøk og førleikamenning høgt, og tað er eisini ætlanin frameftir.

Ferðavinnufelagið fær javnan uppskot til lógir, kunngerðir og vegleiðingar til hoyringar og umboðar limirnar mótvegis politisku skipanini og almennum myndugleikum í málum, sum eru viðkomandi fyri vinnuna. Hetta verður framvegis ein týdningarmikil partur av uppgávuni hjá Ferðavinnufelagnum.

# Lóg fyri Ferðavinnufelagið

§ 1

Navn felagsins er Ferðavinnufelagið og heimstaður felagsins er Tórshavn.

§ 2

Endamál felagsins er at savna allar ferðavinnufyritøkur at útinna felags áhugamál soleiðis at ferðavinnan vinnan gerst týðandi táttur í føroyska búskapinum, kend fyri sína dygd.

§ 3

Umsóknir um limaskap skulu sendast nevndini, sum tekur støðu til umsóknina. Avgerð nevndarinnar kann kærast fyri aðalfund, sum tekur endaliga avgerð.

§ 4

Limirnir hava skyldu at halda viðtøkur felagsins. Tær avgerðir, ið aðalfundurin ella nevndin taka, eru bindandi fyri limirnar.

Um limur ikki vil ganga undir eina tílíka avgerð, kann nevndin koyra viðkomandi úr felagnum uttan ávaring, og kann hesin ikki gerast limur aftur tey næstu tvey árini. Henda avgerð kann tó kærast til aðalfundin, sum tekur endaliga støðu.

Tvey árs eftirstøða inniber, at limur av sær sjálvum missir limaskapin. Áðrenn limaskapurin kann fáast aftur, skal øll skuld til felagið verða goldin.

Um limir melda seg úr felagnum skal hetta gerast skrivliga við 3 mánaða freist til tann 1. januar.

§ 5

Árliga limagjaldið verður ásett á ársaðalfundinum. Fult limagjald verður eisini goldið fyri innlimingarárið. Inngoldið limagjald verður nýtt til rakstur felagsins í tann mun, sum nevndin, heldur, at tørvur er á tí.

Skuldi tað í felagnum verið tørvur á meira peningi fyri at fremja serlig mál, so kann nevndin útvega henda pening við tilskotum frá limunum. Eisini kann aðalfundurin, til útvegan av slíkum peningi, álíkna limunum eykagjald.

Nevndin hevur heimild til at tekna lutapening ella partapening í øðrum feløgum eftir góðkenning frá aðalfundinum.

Felagið verður bundið við undirskrift formansins ella við undirskrift frá tveimum nevndarlimum. Til dagligu umsitingina av sjálvum felagnum kann nevndin geva skrivara/samskipara fulltrú.

Tekur felagið lán ella veðsetir ogn, mugu minst 2/3 av nevndarlimunum skriva undir.

§ 6

Nevndin tekur sær av áhugamálum felagsins, hevur fyrisætið við sjálvum felagnum og ansar eftir, at viðtøkur og samtyktir felagsins verða hildnar. Allar avgerðir á nevndarfundum verða samtyktar við vanligum meiriluta.

§ 7

Aðalfundurin hevur hægsta ræðið í felagnum.

Limir hava eina atkvøðu fyri hvørjar 2.000 kr. í limagjaldi. Eingin limur kann hava meir enn 10 atkvøður.

Eftirstøða í limagjaldi inniber miss av atkvøðurætti.

Limur kann geva øðrum limi skrivliga fulltrú at umboða seg á aðalfundinum.

§ 8

Ársaðalfundurin verður hildin á hvørjum ári - ikki seinni enn 1. november.

Lýst verður til vanliga aðalfundin minst 14 dagar frammanundan. Nevndin ásetir tíð og stað fyri aðalfundin, og avgerð á hvønn hátt hann verður lýstur.

Dagsskráin á vanliga aðalfundinum er henda:
1. Val av fundarstjóra
2. Framløga av limalista
3. Frásøgn nevndarinnar frá farna ári.
4. Framløga av grannskoðaðum roknskapi frá farna ári.
5. Val av nevndarlimum og eykalimum
6. Val av grannskoðara.
7. Áseting av limagjaldi fyri komandi árið.
8. Ymiskt.

Allar samtyktir á aðalfundinum skulu skrivast í gerðabókina.

§ 9

Øll mál, felagnum viðvíkjandi, kunnu viðgerast á vanligum aðal- ella eykaaðalfundi. Viðtøkubroyting kann bert fara fram, tá ið uppskot um broytingina er sett fram frammanundan, og uppskotið er lýst í kunngerðini um aðalfundin.

Har ikki annað er tilskilað í viðtøkunum, verða allar avgerðir samtyktar við vanligum meiriluta.

Til at broyta viðtøkur felagsins krevst, at í minsta lagi 2/3 av teimum greiddu atkvøðunum eru fyri uppskotinum, og at minst helvtin av øllum limunum eru umboðaðir á aðalfundi.

Er vanligi aðalfundurin ikki viðtøkuførur, verður kallað til eykaaðalfund sambært ásetingunum í grein 11. Á eykaaðalfundinum kann slíkt uppskot verða samtykt við minst 2/3 av greiddu atkvøðunum, hóast minni enn helvtin av limunum eru umboðaðir á fundi.

§ 10

Á hvørjum aðalfundi kann hvør yrkisgrein velja eitt ella fleiri umboð, sum vísa til nevndina og eru ráðgevandi hjá nevndini í spurningum, ið viðvíkja ymsu yrkisgreinunum.

Stk. 2. Um umboð ikki verða vald á aðalfundinum, kann nevndin seta hesi umboð seinni.

Stk.3. Nevndin kann gera starvsskipan fyri umboðini.

§ 11

Í nevndini sita 3 ella 5 limir, ið verða valdir millum limir felagsins.

Nevndarlimirnir verða valdir fyri 2 ár í senn, soleiðis at annað hvørt ár stendur 1 (2) og annað hvørt ár 2 (3) limir fyri vali.

Harumfamt verður 1 tiltakslimur valdur á hvørjum ári.

Nevndin skipar seg sjálv. Á hvørjum nevndarfundi verður gerðabók førd, sum verður undirskrivað av hjástøddu nevndarlimunum.

§ 12

Eykaaðalfundurin kann verða hildin, tá ið í minsta lagið 2 nevndarlimir ella limir, ið umboða minst 1/5 av atkvøðunum, krevja tað. Nevndin ásetir tíð og stað fyri eykaaðalfundin, sum verður kunngjørdur við minst 7 daga ávaring

§ 13

Felagsins roknskaparár er álmanakkaárið.

Roknskapurin verður grannskoðaður av felagsins grannskoðara.

§ 14

Felagið kann verða avtikið við aðalfundarsamtykt eftir somu ásetingum, sum eru galdandi í sambandi við viðtøkubroytingar.

§ 15

Verður felagið avtikið, verða ognir felagsins at nýta til frama fyri ferðavinnuna, soleiðis sum aðalfundurin tekur avgerð um.

- 0 -

Viðtøkurnar eru samtyktar á stovnandi aðalfundi 31. oktober 2008.
Broytingar eru samtyktar á aðalfundi 30. oktober 2009.
Seinni broytingar samtyktar á aðalfundi 7. mai 2013.